einfaldari
- ger tað einfaldari

Juni 2010

Familjan Johannesen heima aftur

Shamila og Høgni Johannesen saman við døtrunum Adoniu og Joy

Shamila og Høgni Johannesen, sum hava búð í Birmingham í Onglandi, har tey hava virkað saman við trúboðanarfelagsskapinum OM, eru flutt heim til Føroyar at búgva. Tey halda tó á at arbeiða saman við OM í sambandi við trúarverju. Høgni sigur, at tað er ein stór kollvelting og ein avbjóðing fyri tey nú at skula arbeiða út frá Føroyum.

lívdin
– í lívd hins hægsta
Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

Broytingartíðir

Vit liva í broytingartíðum - eisini í samkomuni. Lívdin broytist, vit broytast. “Broyting“ er eitt av torførastu orðunum í samkomuni. Broytingar verða mangan hildnar at vera beinleiðis av tí ónda. Men broyting er nakað, sum eigur at eyðkenna andaliga lívið frá byrjan til enda. Heilaggeringin er jú ein vøkstur og ein tilgongd, har Gud broytir okkum og ger okkum meira og meira lík Jesusi Kristi, Harra okkara. Paulus sigur: „Tí tey, sum Hann frammanundan kendi, tilskilaði Hann eisini frammanundan at verða gjørd lík mynd Sonar Síns“ (Róm. 8:29). Tann samkoma, ið ikki kennir hesa tilgongd og hendan vøkstur, skal heldur ikki vænta stóra heilaggering. Men tann samkoma, sum livir í heilaggering, skal vænta stórar og góðar broytingar.

Jógvan Zachariassen

Lívdin

Tøkk frá Christmas Child

Frá tiltakinum Operation Christmas Child ljóðar ein stór tøkk til øll, sum stuðla. Takkað verið tær dansa børn av gleði. Takka verið tær, renna børn runt av gleði og vísa sína gávu fram.

Hvør skógvaeskja ber boðskapin um kærleika til barnahjørtu, sum hjá Marshu. Tá hon letur sína eskju upp, fer hon at flenna av gleði. ”Er hetta alt til mín?” Skrálandi hálar hon einar ljósareyðar handskar og eina lilla tasku upp úr eskjuni. Marsha er bara 6 ára gomul, og álíkavæl veit hon, hvat tað vil siga at vera einsamøll. Hon býr á einum barnaheimi i Hvítarusslandi, tí mamman er í fongsli. Marsha vónar, at hon skjótt fær eina nýggja familju. Sum hon tekur sín yndisgávulut í hendurnar, sigur hon: “Eg elski alt í míni skógvaeskju, men serliga dukkuna við appelsingulum hári. Eg fari at kalla hana Mumma!”

Um tú vilt vera við til at skipa fyri Operatión Christmas Child, kanst tú seta teg í samband við Beintu Áargarð 512655 ella Duritu Djurholm tlf 230833. Tær hava staðið fyri hesum í 7 ár og vilja fegnar síggja onnur bera hetta verk víðari.

Meira kann lesast um seinastu útbering av skógvaeskjum á www.operationchristmaschild.org.uk/pages/2009-thank-you

Til lukku við barninum

2. mai fingu Ilda og Rúni Lómstein í Streymnesi eina dóttur. Hon var 55 cm long, vigaði 4.000 gr og eitur Rita Sofia Lómstein.

Til lukku við gullbrúdleypinum

Týsdagin 4. mai høvdu Marita og Leivur Guttesen gullbrúdleyp.
Dagurin varð hildin á Hotel Hafnia leygardagin 8. mai fyri innbodnum.

Til lukku við hjúnabandinum



Leygardagin 15. mai giftust Maiken við Skipá og John Pedersen í Filadelfia í Havn. Dagurin varð hildin á Hotel Føroyum fyri innbodnum.

Sirikit við nýggjari fløgu

Sirikit Jacobsen er komin út við nýggju fløguni "Lyftið", sum er ein lovsongsfløga, hvørs endamál er at prísa Harranum og at vísa menniskjum á Hann, sum signar og troystar.

Sirikit eigur orð og lag á øllum 12 sangunum. Jákup Zachariassen, Kristoffer Mørkøre, Gunnar Guttesen og Jesper Thomsen spæla á ljóðførini.

Hon fæst kring alt landið. Kostnaður er 169 krónur.

Jóna tvey ár afturat í Chile

Eftir at hava verið í tænastu hjá trúboðanarfelagsskapinum OM í Chile síðan august í fjør, er Jóna Gunnarsson komin heim at halda summarfrí.

Jóna fór úr Føroyum 19. august í fjør. Saman við øðrum er hon send út frá OM (Operation Mobilisiation) til Santiago, har tey m.a. arbeiða á barnaheimum, umframt at tey fáa undirvísing í mentan og sponskum.
Tann 16. august fer hon aftur til Chile at vera í tvey ár afturat. "Eg eri sera spent upp á at fara aftur til Chile, tí eg veit, at tað er har, Gud vil hava meg at vera," sigur Jóna, sum upplivdi tann harða jarðskjálvtan í Chile tann 27. februar, sum kostaði umleið túsund mannalív umframt stórar oyðileggingar.

Zareptalegan 2010

Zareptalegan hjá Lívdini var í døgunum 7.–9. mai. Nógv fólk høvdu teknað seg til leguna, sum varð hildin í fínasta veðri, serliga leygardagin, tá øll hugnaðu sær úti í sólini.

Evnið á leguni var "Aftur til krossin". Tosað varð m.a. um kross Kristusar sum grundarlag fyri trúgv og lívi okkara.

Myndir frá Zareptaleguni 2010

Tiltøk

Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)

1. juni	**Bønarmøti**
8. juni	**Kyknubólkar**
15. juni	**Bønarmøti**
22. juni	**Bønarmøti**
29. juni	**Kyknubólkar (breyðbróting í kyknubólkunum)**

Avvarðandi hjá rúsmisnýtarum

Avvarðandi hjá rúsmisnýtarum er ein sjálvhjálparbólkur í Lívdini, sum savnast umleið sættu hvørja viku. Bólkurin er ætlaður avvarðandi hjá fólki við rúsevnis-, tablett- og rúsdrekkatrupulleikum. Bólkurin savnast næstu ferð mikudagin 23. juni. Meiri fæst at vita frá Rúnu Berghamar, tlf. 316033.

Alpha-skeið fyri ung

Sunnudagin 23. mai byrjaði U-Alpha fyri tey uml. 30 ungu, sum ganga í UngLív.

Endamálið við U-Alpha er at leiða tey ungu í eitt livandi samfelag við Jesus. Umframt at læra at lesa í Bíbliuni og um bøn verður dentur lagdur á opinleika, har tað er loyvi at spyrja um alt.

Ymisk fólk úr Lívdini koma at undirvísa og bólkaleiðararnir eru eisini úr Lívdini.

Skeiðið endar 26. september við eini Alpha-veitslu. U-Alpha gongur yvir 11 sunnudagar og eitt vikuskifti. Steðgur er í skeiðnum, meðan summarfrítíðin er.

IKTUS tvey ár

Kristiliga sjónvarpsrásin IKTUS skipaði fyri einum sjónvarpskvøldi í Løkshøll í Runavík leygarkvøldið 8. mai í sambandi við, at tvey ár eru liðin, síðan rásin varð stovnað.

Anja Hansen er sjónvarpsstjóri í IKTUS

Køksbønin stuðlar nýggja bygninginum

Køksbønin fæst nú til keyps í Livdini í trimum ymiskum støddum (A6, A5 og A4) sum kosta ávikavist 10, 20 og 30 krónur. Tað er Astrid Mouritsen, sum ger hesar plakatir. Peningurin fer óskerdur til nýggja bygningin hjá Lívdini.

Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

Sunnudagin 6. juni

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Evni: Missiónsmøti*
Fyriskipari: Ólavur Jøkladal

Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Hvussu skulu vit so ikki liva?*
(Róm. 13:13-14
Talari: Jógvan Zachariassen
** Hallur og Shino Mortensen verða send út sum trúboðarar*

Ólavur

Sunnudagin 13. juni

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Evni: Arbeiðið í Chile*
Talari: Jóna Gunnarsson

Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Frælsi og náði í lívinum*
(Róm. 14:1-12)
Talari: Jógvan Zachariassen

Jógvan

Sunnudagin 20. juni

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Evni: Kreativt fyri børnini*
Fyriskipari: Guttorm Joensen

Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Javnvág í frælsi og kærleika*
(Róm. 14:13-23)
Talari: Jógvan Zachariassen

Jóna

Sunnudagin 27. juni

Einki møti í skúlanum (Drotningavitjan)
Um viðrar verður skipað fyri samkomuútferð.
** Lýst verður nærri á heimasíðuni www.livdin.fo*

Ungdómstiltøk:

Hyperlink: Fríggjakvøld kl. 21.00
Alive: Leygarkvøld kl. 21.00 *(Tema tríeindin v.Jógvan Zachariassen)*
** Leygarkvøldið 26. juni verður einki tiltak í skúlanum*

Guttorm

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · faldarin@livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson